## Bókakafé

Í kvøld, 6. desember, verður bókakafé í Hafnia Lounge í Havn. Har fer Martin Joensen at siga frá bókini „Lat meg goyma teg“, Jóhanna á Tjaldraflótti og Elisabeth Akursmørk fara at greiða frá bókini „Lætt og leskiligt 2“, og Hedvig Westerlund fer at siga frá „Einum jólaævintýri“ og jólasjónleiki. Eisini verður okkurt spennandi frá Riti & Ráki. Bókakaféin í Hafnia Lounge byrjar klokkan 20.

## Kinesisk list

Leygardagin læt ein heldur sjáldsom listaframsýning upp í býráðssalinum í Runavík. Tað er kinesiska listakvinnan Yan Jingrui, sum sýnir fram. Á framsýningini hevur hon 20 vatnlitsmyndir við myndaevnum úr kinesisku náttúruni umframt ymsar hondgjørdar kinesiskar prýðislutir. Framsýning hennara er opin gerandisdagar frá kl. 10 til 16 og leygardagar og sunnudagar millum kl. 14 og 20. Opið er til tann 17. desember.

Oljuleki í Vági:

# Gera alt fyri at binda um heilan fingur

**– Enn er eingin katastrofa hend, og vit vóna, at støðan ikki gerst verri, enn hon er, sigur John Danielsen, deildarleiðari hjá SEV**

OLJULEKI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Síðstu nátt lá ein tangabátur á Vági og pumpaði olju upp í ein av stóru tangunum, sum SEV hevur á Oyrunum á syðra armi á Vágsfirði. Tá ið fult var móti morgni, síggja menn, at tangin lekur í botninum. Ein tangagarður er rundan um tangarnar, og tá ið Sosialurin tosaði við SEV í morgun, tók garðurin ímóti olju, sum lekur úr tanganum.

Talan er ikki um smávegis nøgdir av olju, sum eru í tanganum, ið er farin at leka.

### 2500 tons

John Danielsen, deildarleiðari hjá SEV, sigur, at tangin, sum talan er um, tekur 2500 rúmmetrar av olju og er fullur.

Tangagarðurin tekur ikki ímóti allari oljuni, um SEV saman við øllum teimum fólkum, sum nú eru í gongd í Vági, ikki megnar at fáa oljuna til høldar aðrastaðni.

– Vit gera nú alt fyri at binda um heilan fingur. Enn er eingin katastrofa hend, og vit vóna, at støðan ikki gerst verri, enn hon er.

John Danielsen sigur, at eitt stórt ”apparat” er sett í gongd í Vági til tess at byrgja upp fyri, at tað ringasta spyrst burtur úr oljulekanum, um illa vil til.

– Allir ”instansir” eru boðsendir og meira enn tað, bæði løgregla, vaktartænasta, bjargingarfeløg, tryggingarfelag, oljufelagið, sum hevur latið oljuna og onnur.

### Pumpa olju

John sigur, at ein annar minni tangi, sum tekur 1000 rúmmetrar av olju, stendur beint við síðuna av stóra tanganum, og nú verður roynt at pumpa olju úr tanganum, sum lekur yvir í hendan tangan.

– Tangabáturin, sum kom við oljuni, liggur framvegis á Oyrunum, og vit pumpa eisini olju yvir í skipið aftur, sigur John Danielsen hjá SEV.



*Tangaskipið sum kom við oljuni til Vágsverkið síðstu nátt*

*Mynd: Dagfinn Olsen*

SEV við fráboðan:

# Leki á oljutanga á Vágsverkinum

**– Talan er um tungolju, sum storknar, tá ið hon kólnar, og tí er ikki stórur vandi fyri, at oljan fer niður í undirgrundina, sigur SEV í tíðindaskrivi í morgun**

OLJULEKI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Alt verður gjørt til tess at forða fyri, at olja endar á sjónum, eftir at menn í morgun vóru varugir við ein leka í tí eina oljutanganum hjá SEV á Vágsverkinum.

Soleiðis ljóðaði fráboðanin hjá SEV um lekan í Vági, sum vit fingu beint fyri klokkan 11 í morgun.

### Skipið liggur

Lagt verður aftrat, at bjargingareindir í løtuni royna at forða fyri, at olja fer á sjógv frá Vágsverkinum.

– Menn vóru varugir við, at tann eini oljutangin á verkinum lekur. Lekin var staðfestur í sambandi við, at SEV fekk olju frá einum skipi frá Shell.

SEV sigur, at Shell eftir áheitan frá elfelagnum hevur játtað at hava skipið liggjandi í Vági, og verður olja nú pumpað umborð aftur, samstundis sum olja verður pumpað yvir í tann minna oljutangan.

– Sum er, lekur olja út í tangagarðin, ið er rundan um tangan, og verður oljan steðgað har.

Í tíðindaskrivinum sigur SEV seg vóna at hava tómt tangan, áðrenn størri nøgd er likin út í tangagarðin.

### Tungolja

Lagt verður aftrat, at talan er um tungolju, sum storknar, tá ið hon kólnar, og tí er ikki stórur vandi fyri, at oljan fer niður í undirgrundina.

At enda sigur SEV, at elfelagið, Shell, sløkkilið, løgreglan og MRCC royna at gera alt fyri, at skaðin á umhvørvið verður so lítil sum møguligt.